GJALDSTOVAN

Argir, 12. februar 2015

# Verkætlanarleiðari til Talgilding Landsins

## Inngangur

Í samsvari við ásetingar um alment innkeyp, bjóðar Gjaldstovan leiklutin út sum verkætlanarleiðari fyri verkætlanina Talgilding Landsins. Verkætlanarleiðarin skal standa fyri at gera strategi fyri at talgilda tænasturnar hjá tí almenna. Strategiin skal vera liðug við árslok í 2015.

## Bakgrund og endamál

Gjaldstovan tók á vári í 2014 stig til at gera kjakupplegg um KT-strategi Landsins. Tað varð gjørt í tilgongd við aðalstjórum, stovnsleiðarum og KT-ábyrgdarfólkum innan tað almenna.

Talgildingin hevur sum endamál at nútímansgera vælferðartænastur, stimbra kappingarføri, vøkstur og framleiðsluorku, umframt at skapa fyritreytir fyri at effektivisera almenna geiran munandi.

Talgildingin hevur við sær, at borgarar og virki samskifta talgilt við almenna geiran, at fyrisitingarligar tænastur hjá tí almenna eru tøkar á netinum og at veitingar og mannagongdir í almennu fyrisitingini eru talgildar.

Á heysti í 2014 hava Vinnumálaráðið (VMR), sum hevur KT-politikk sum málsøki, og Fíggjarmálaráðið (FMR), sum hevur KT í landsumsitingini sum málsøki, saman við Gjaldstovuni arbeitt víðari við næsta stigimóti samskipaðari strategi fyri talgilding. Hetta arbeiðið hevur verið grundarlag undir teimum 2 mió. kr., sum eru játtaðar í fíggjarlógini fyri 2015. Tilfar frá omanfyrinevndu átøkum er at finna á http://gjaldstovan.gov.fo/kt-landsins/kt-strategi-landsins

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | ARGIR | POSTBOKS 2009 | FO-110 TÓRSHAVN | FØROYAR
TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO

Økini, sum dentur verður lagdur á í strategimenningini eru:

1. **KT-tænastur millum tað almenna, vinnu og borgaran:**
   Hetta snýr seg um strategi fyri at samskipa og menna grundskráir, borgara- og vinnuportal, trygt samskifti og gjaldsskipanir.
2. **KT-nýtsla og rakstur í almennu fyrisitingini:**
   Hetta snýr seg um strategi fyri at effektivisera KT-nýtsluna og KT-raksturin í almennu fyrisitingini. Tað snýr seg um at standardisera, útvega felags skipanir og fáa synergi og stórrakstrarfyrimunir.

Næsta stigið, og fyrsta uppgávan hjá komandi verkætlanarleiðara, er at gera eina nágreiniliga verkætlanarlýsing av tí arbeiði, sum skal fremjast í ár.

## Verkætlanarbygnaður

VMR hevur í samráð við FMR gjørt avtalu við Gjaldstovuna um at hýsa og fremja verkætlanina.
Deildarstjórin á KT Landsins, sum er deild á Gjaldstovuni, hevur dagligu ábyrgdina av verkætlanini og virkar sum verkætlanarstjóri. Deildarstjórin á KT Landsins velur verkætlanarleiðaran saman við umboðum fyri stýrisbólkin. Verkætlanarleiðarin fær ábyrgd av at leiða verkætlanina í tøttum samstarvi við verkætlanarstjóran. Arbeiðsstaðurin er á Gjaldstovuni, sum útvegar høliskarmar til skrivstovur, fundarvirksemi og útgerð.

## Stýrisbólkur

Stýrisbólkurin verður mannaður soleiðis: Aðalstjórin í VMR er verkætlanareigari og stýrisbólkaformaður, aðalstjórin í FMR er varaformaður. Aðrir limir eru Løgmansstjórin, stjórin á Gjaldstovuni, umboð fyri vinnuna og umboð fyri kommunurnar.

## Verkætlanarráð

Tosað hevur verið um at manna eitt ráðgevandi forum, sum er mannað við fakliga dugnaligum og royndum profilum, sum vísir til stýrisbólkin. Limirnir í ráðnum umboða bæði privata og almenna geiran, og hava sum uppgávu at meta um strategi og ítøkiligar verkætlanir, tá ið talan er um business cases, raðfestingar, váðametingar og annars at geva stýrisbólkinum góð ráð.

## Projektbólkur, ráðgevar, arbeiðsbólkar og tilvísingarbólkar.

Í uppritinum til Stjóraráðið er skitsa við ymiskum ráðgevaraprofilum og arbeiðs- og tilvísingarbólkum. Hvussu hesi skulu verða mannað og skipað er týdningarmikil spurningur at svara í fyrireikingartíðini.

## Verkætlanaruppgávan

Í uppritinum til Stjóraráðið er eitt verkætlanarhugskot, har dømi um viðkomandi og møgulig mál eru orðað. Hesi mál skal verkætlanarleiðarin arbeiða meiri við og raðfesta:

### Mál 1: Strategi fyri talgilding og KT í almennu umsitingini 2016 – 2020.

A: Støðulýsingar

B: Partstrategiir fyri grunddata, trygt samskifti, borgara- og vinnuportal og KT í almennu umsitingini

C: Greina og gera yvirskipaða strategi og tilmæli fyri talgilding í geirunum

D: Átøk og tíðarætlan 2016 - 2020

E: Business cases, tvs. lýsa nyttu, kostnað og avleiðingar.

F: Tilmæli um at skipa talgildingina 2016 – 2020.

### Mál 2: Eyðmerkja fyritreytir og forðingar

A. Business case fyri einstøku økini og átøk.
B. Standardiserað undirstøðukervi
C. Fakskipanir í umsitingini
D. Rakstrar- og tænastudeplar
E. Løgfrøðiligir spurningar
F. Fyriskipanarlig viðurskifti
G. KT arktitekturur
H. Skipa og fíggja í sambandi við at fremja strategiina

### Mál 3: Ítøkiligar verkætlanir

Fryst og fremst er talan um at taka stig, fyrireika og seta gongd á verkætlanina talgild undirskrift. Aðrar nærliggjandi verkætlanir eru grunddata, portalar og felags fakskipanir í umsitingini.

## Leikluturin og høvuðsuppgávurnar

Uppgávan hjá komandi verkætlanarleiðara fatar m.a. um:

- Yvirskipaða strategiska verkætlanarleiðslu saman við verkætlanarstjóra og stýrisbólkinum, har ein av týdningarmestu uppgávunum er at tryggja kunning, fatan og undirtøku millum allar týdningarmiklar áhugabólkar.
- Operationella verkætlanarleiðslu, har ætlan skal leggjast fyri uppgávurnar sum skulu fremjast. Hetta verður gjørt saman við verkætlanarbólki, ráðgevum, arbeiðs- og tilvísingarbólkum.

Herumframt verður væntað, at verkætlanarleiðarin luttekur og skipar fyri verkstovum, tryggjar haldgóða skjalfesting, luttekur í greiningararbeiði og er virkin í sambandi við at orða konsept, loysnir og strategiir.

Verkætlanarleiðarin hevur serstaka ábyrgd at tryggja effektivitet og góðsku í tilgongd, arbeiðs-gongdum og av veitingum.

## Vavið av veitingini

Verkætlanarleiðarin skal arbeiða áleið fulla tíð í tíðini, frá tí hann tekur við uppgávuni og árið út. Roknað verður við summarsteðgi á 5-6 vikur í juli og august, eftir avtalu. Gjaldstovan leggur dent á, at talan er um fulltíðarstarv, og sum meginregla skal verkætlanarleiðarin ikki loysa uppgávur fyri aðrar kundar í tíðini, henda uppgáva skal loysast. Eisini leggur Gjaldstovan dent á, at verkætlanarleiðarin er sinnaður at arbeiða skiftandi arbeiðstíðir, tá ið tað krevst fyri at halda tíðarfreistir og aðrar avtalur.

## Minstakrav til førleikar

1. **Projektleiðsluførleikar**

   Viðkomandi hevur, innan seinastu 8-12 árini, á leið 5 ára royndir í projektleiðslu, av teimum minst 3 ára royndir sum verkætlanarstjóri, programm- ella verkætlanarleiðari í stórum og fjøltáttaðum verkætlanum.

   Talan er sostatt um førleikar, sum sambært IPMA/PMI skipanum svara til í minsta lagið B stig. Hetta skal kunna skjalprógvast, annaðhvørt við

altjóða góðkendum certificeringsprógvi ella á annan sannførandi hátt, við royndum sum samsvara.

2. **Viðkomandi hægri útbúgving frá lærdum háskúla**
   Viðkomandi skal hava akademiska útbúgving, ella útbúgving sum samsvarar.
3. **Arbeiðsroyndir frá føroyskum KT-verkætlanum, helst KT-verkætlanir hjá tí almenna** Viðkomandi skal hava innlit í føroyska KT-umhvørvið. Fyrimunur er at kenna samanhangir innan KT hjá tí almenna og hava innlit í virksemið hjá føroyskum KT-veitarum.

## Krøv til tilboðið

Tilboðið skal fata um hesar upplýsingar

- Navn og CV hjá tí, sum skal hava leiklutin sum verkætlanarleiðari.
- Navn og skrásetingarnummar hjá fyritøkuni, sum stendur umboðar verkætlanarleiðaran, umframt eina almenna lýsing av førleikum og veitingum hjá fyritøkuni og royndum hennara. Hevur ráðgevin ikki v-tal, tá ið søkt verður, skal hetta verða fingið til vega og verða upplýst seinni.
- Frágreiðing um, hvussu minstukrøvini 1 – 3 eru lokin
- Frágreiðing um aðrar viðkomandi útbúgvingar, vitan og royndir, sum ráðgevin hevur, sum kunnu koma verktætlanini til gagns.
- Dømi um viðkomandi kundar og viðkomandi uppgávur, sum ráðgevin hevur loyst. Gjaldstovan fær heimild at venda sær til hesar kundar fyri at fáa ummæli av ráðgevanum.
- Kostnaðin pr. tíma fyri uppgávuna

## Velja verkætlanarleiðara

Valt verður millum innkomnu tilboðini eftir samlaðari meting út frá niðanfyristandandi vekting.

| Krav | Vekt |
|---|---|
| Førleikar, útbúgving og royndir | 50% |
| Tímakostnaður | 50% |

Gjaldstovan tilskilar sær rætt til ikki at velja nakað av innkomnu tilboðunum, t.d. um mett verður at eingi av tilboðunum lúka krøvini.

GJALDSTOVAN

## Innlating og tíðir

Freistin at lata tilboð inn er mánadagin 27. februar 2015 kl. 12:00. Tilboð sum verða móttikin eftir freistina verða ikki viðgjørd.
Tilboðið kann sendast við posti til: Gjaldstovuna, postboks 2009, FO – 110 Tórshavn. Att. Nicolai Balle.
Tilboðið kann eisini latast inn umvegis teldupost á nicolai.balle@gjaldstovan.fo.
Ynskiligt er, at verkætlanarleiðarin kann byrja skjótast gjørligt.

| **Freistir** | **Hending** | **Viðmerking** |
|---|---|---|
| 12. feb | Útboð kunngjørt á Keypsportalinum | Útboð kunngjørt á www.keypsportal.fo |
| 19. feb. kl. 15 | Spurningar og svar | Spurningarnir skulu vera skrivligir og sendast nicolai.balle@gjaldstovan.fo Spurningarnir verða síðan viðgjørdir og svaraðir í seinasta lagi 20. februar. Skjal við svarunum til spurningarnar verður lagt á Keypsportalin. |
| 23. feb. kl. 12 | Lata inn tilboð | |
| 23. til 26. feb. | Viðgera tilboð | Gjaldstovan tilskilar sær rætt at biðja tilboðsgevara koma á fund, áðrenn endalig støða verður tikin. |
| 27. feb. | Kunngerða vinnara | Vinnarin av útboðnum verður almanna-kunngjørdur á Keypsportalinum, so skjótt avgerðin er fallin og væntandi 27. februar. |